DAGSINS MEINING

Samgonguskrædl

Fíggjarlógarviðgerðin á tingi bendir á, at vit fara at fáa eitt samgonguskrædl um ikki so langa tíð. Skulu vit døma eftir úttalilsunum hjá fleiri av samgongufólkunum undir viðgerðini seinastu dagarnar, so er totalt kaos á fíggjarlógarøkinum. Løgmaður, sum annars eigur at vera borganin fyri, at mál, sum fara niðan í tingið, hava undirtøku millum samgonguflokkarnar, hevur eftir øllum at døma bara latið standa til og sett seg afturá fyri at eygleiða tað innanhýsis stríð, sum mangulfulla fíggjarlógin hevur við sær.

Tað ber illa til at lesa líkasælu og dvalakendu støðu løgmans í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina sum annað enn, at hann fegin sær, at samgongan slitnar. Tað er einasta náttúrliga svarið til hansara passivitet og apati og tað fulkomna kaos, ið ræður.

Viðgerðin hevur víst, at uppskotið til fíggjarlóg er bara ein karmur heldur enn eitt detailierað lógaruppskot, sum tað eigur. Nú skulu so fíggjarnevndarlimirnir til at fylla henda karmin út so ella so. Okkurt aftrat her og okkurt burtur av har. Hetta er kanska ikki so óvanligt men tað óvanliga er, at meðan hetta fyrr hevur hoyrt til undantakið, er hetta nú júst øvugt. Nú er undantakið vanin. Nærum alt uppskotið sum tað er er fyribils. Skulu bara nøkur heilt fá av teimum mongu ynskjunum og krøvunum, sum samgongufólk hava til uppskotið, verða tikin til eftirtektar, so fer talan at verða um ein hóp av eykafíggjarlógum. Hetta er so í fullkomnari andstøgn til tað, sum formaðurin í Fíggjarnevndini segði so avgjørdur við fíggjarmálaráðharran herfyri, nevniliga, at hann fór ikki at góðtaka fleiri eykajáttanaruppskot. Nú sær út til, at hann verður noyddur at eta hesi orð í seg aftur, tí tað rætt og slætt ikki slepst undan eykajáttanarlógum og serlógum fyri eitt nú at kunna røkka kravinum um undirsjóvartunnil til Norðoyggjar og til skattalætta.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum fýltist undir viðgerðini harðliga at samgonguni og segði, at eingin politikkur er at síggja aftur í fíggjarlógaruppskotinum og helt hann tað vera ótrúligt, at samgongan bara kann halda fram, um so er at andstøðuflokkarnir stuðla tí fíggjarlóg samgonguflokkarnir ikki sjálvir kunnu semjast um. Ella sum tingmaðurin Henrik Old segði undir viðgerðini: var atkvøtt fyri fíggjarlógini í dag, so lá hon skerfløt.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Siglir Øssur í sigartoku?

Tórbjørn Jacobsen
natoja@ft.dk

Tað sigst um ein ávísan, at tá ið hann fór at eldast, leitaði hann sær í kleystur. Hetta sama kann ikki sigast um Øssur Dam Jacobsen. Minnist hann bara sum ein siðiligan og sáttligan tingmann úr Vestmanna. Væl er fráliðið síðani. Nú tykist maðurin at hava skift ham á gamalsaldrinum. Líkist meira stavnamanninum, tá ið hesin var yngri, og meiri trivaligur í retorikkinum. Húðfletti alt sum fyri var. Havi ikki sæð nakað tíðindaskriv frá radikala sjálvstýrinum um, at teir hjálpa hvørøðrum við lesarabrøvum, men okkurt bendir á, at har situr ein lítil fitt losja, í akkumuleraðari øði, og frustratión, og varpar sakleys offur út á hermóti, í eini neyðarsligari roynd at niðurgera onkran, sum roynir at gera eitt erligt politiskt arbeiði. Handan gluggaklæðini skula tit allir samlir vera so sára vísir í, at hetta verður sum at sletta vatn á gás. Hvørki meiri ella minni.

Tjóðveldisflokkurin stillaði ikki upp til fólkatingsvalið, tí vit ætlaðu okkum á fólkating fyri at sita har og trilla tummlar og gána upp undir kongaligu ljósakrúnurnar.

Vit stillaðu upp til fólkatingsvalið, tí fólkatingið er eitt forum, har vit kunnu virka til frama fyri hugsjónini um tær frælsu Føroyar.

Tað er undirritaði, sum floksins umboð á fólkatingið, sum meti um, hvussu vit frægast fáa brúkt hendan pallin, hitt danska parlamentið, til frama fyri hesi somu hugsjón.

Higartil hevur arbeiðshátturin verið, at verið virkin, í fólkatingssalinum.

Við at seta fram skrivligar og munnligar spurningar, til allar teir ráðharrar, sum varða av føroyskum viðurskiftum, soleiðis at tey føroysku atlitini og tey føroysku áhugamálini ongantíð verða gloymd.

Tað havi eg gjørt við stoðugt at vísa á ta ódemokratisku støðu, harið danska statsvaldið umboðar Føroya land og Føroya fólk í hernaðarmálum og uttanríkismálum, uttan at vit so frægt sum fáa innlit í viðurskiftini.

Tað geri eg við at kunna um okkara politisku stevnu á fundum í bæði Føroyum, Grønlandi og Danmark.

Tað geri eg við at samstarva við grønlendsku fólkatingsumboðini, soleiðis at okkara felags stríð fær størri megi.

Haldi, at tað hevur gingist so toluliga. Hætti mær, í allari beskeðinheit, at siga, at ein føroyskur fólkatingssessur ikki í nógv, nógv ár hevur verið bróktur so nógv og so væl, sum síðani Tjóðveldisflokkurin vann annað av føroysku umboðunum á valinum seinasta heyst.

Ein gamal løgtingsmaður átti at vita, at í einum parlamenti verður mesta arbeiði ikki gjørt í tingsalinum. Har verða hugsjónirnar og retorikkurin fýrdur av. Mesta arbeiði og djúptøkna viðgerðin av málum fer fram í ymsu nevndunum.

Tá uppskot mítt um sjálvsavgerðarrætt Føroya fólks var fyri á danatingi, varð tað t.d. beint í politisku-búskaparligu nevndina.

Viðgerðin gekk væl í tingsalinum - men táið málið eftir 1. viðgerð varð beint í nevnd, mátti eg sleppa endanum. Fekk ikki verið við meir. Tað var latið upp til danskar parlamentarikarar einsamallar at viðgerða. Síðani datt tað burtur. Ætli mær at taka tað framaftur einaferð í vetur, so fáa vit at síggja hvussu leikur fer. Nú hava vit í hvussu er optimalar møguleikar fyri at fylgja málinum, fram til endans.

Sum støðan hevur verið, var hetta nevndarloysi sjálvandi ein vansi, vildi tú gera eitt dygdararbeiði. Tí havi eg valt at fara uppí hesa nevndina, sum eisini viðgerð onnur mál av týdningi fyri Føroyar. Hetta, ikki tí eg ætli mær at luttaka í donskum innlendispolitikki, men heldur tí at eg ætli mær at fáa størst møguliga ávirkan á tey mál, sum snúgva seg um Føroyar og okkara viðurskifti.

Hetta var orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin stillaði upp til fólkatingsvalið. Vit vildu hava ávirkan á tað, sum snýr seg um Føroyar. Og vit vildu brúka okkara ávirkan.

Vit eru ikki partur av nøkrum donskum fólkatingsbólki. Vit hava okkara egna bólk. Hjálandabólkin. Norðuratlantsbólkin. Ein alliansa av trimum sjálvstýrismonnum úr Grønlandi og Føroyum.

Síðstu fýra árini sótu Jóannes Eidesgaard og Óli Breckmann á danatingi.

Tá Óli segði ja, segði Jóannes nei. Og tá Jóannes segði nei, segði Óli ja.

Teir kolldømdu, ella rættari, ógildaðu ávirkanina hjá hvørøðrum. Harvið høvdu teir absolut onga ávirkan á nakað sum helst, sjálvt um báðir, íðnir royndu at reka danskan innlendispolitikk, - í hvør sínum leiri.

Tá bankamálið var fyri, gjørdu teir sína skyldu, og atkvøddu ikki ímóti føroyskum áhugamálum. Fyrr var illa.

Men annars gjørdu teir so at siga einki, sum føroyskir fólkatingsmenn. Sjaldnir gestir í tinginum. Eingin visti, at teir vóru til, sum slíkir. Hóast 1.000 føroysk mál áttu at verið tikin upp, tóku teir einki upp. Alt fór bara aftur við borðinum.

Er tað tað, Øssur Dam Jacobsen vil hava? Vil hann hava tvey føroysk fólkatingsumboð, sum kanska halda eina talu annaðhvørt ár, og annars einki annað gera enn at heva sína løn?

Tað halda vit ikki í Tjóðveldisflokkinum. Vit hildu tað vera meiningsleyst at hava tveir føroyingar sitandi á danatingi, sum ongan annan leiklut høvdu, enn at vera pippandi kanariufuglar í búri hjá ávikavist Socialdemokratiet og Det Konservative Folkeparti.

Á Fólkatingi blandar Tjóðveldisflokkurin seg ikki uppí danskan innlendispolitikk. Hetta hevur altið verið og fer væntandi frameftir, soleingið flokkurin er umboðaður har, at vera hansara støða. Hetta, líkamikið um flokkurin er staddur á røðarapallinum ella í einhvørji fólkatingsnevnd.

Øssur Dam Jacobsen átti eisini at vita, at ein teknisk valsamgonga í einum parlamenti av sær sjálvum einki hevur við politiskt samstarv at gera. Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi er suverenur. Valdi at fara í tekniskt samstarv við Sosialdemokratarnar, SF, Radikala Vinstra og Eindarlistan um nevndarbýtið,

Framhald á næstu síðu

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

UTTAN ÚR HEIMI

Hava vit ikki eisini tørv á eini breiðari móðirmáls siðsemisnevnd?

- so vit kunnu rætta uppá tær talibanlíknandi útreinsingar, sum føroyska móðirmálinum hevur verið fyri

Regin Eikhólm
9/10-2002

Nývaldi "fólkaligi" meirilutin í vísindaligu siðsemisnevndini hevur fingið av at vita bæði av tingsins røðarapalli og í fjølmiðlunum, tí sagt verður, at tey átrúnarliga á fundamentalistiskum ástøði bert umboða ein lítlan minniluta í Føroyum. Um hald er í tí sum sagt verður, so er hetta kortini ikki fyri føroyingin nøkur óvon støða, tí tað fundamentalistiska hugrákið hevur í mong ártíggir stórtrivist eitt nú í okkara almennu puristisku móðirmálsrøkt, men tað bøtir sjálvsagt ikki um støðuna.

Við fundamentalistiskum undirtónum og málsliga misskiltum nationalromantiskum aroma hevur ein lítil minniluti í mong ártíggir einvegis framt íslandifila purismu í føroyska málinum. Vit hava eisini í sama tíðarskeiði fingið ein hóp av meir ella minni hepnum nýføroyskum orðum, men úrslitið er, so løgið tað ljóðar, eitt minni nuancerað og fremmandagjørt móðirmál uttan egið alfabet.

Fleiri hundrað ára intensiv samvinna við Danmark hevur givið eina málsliga endurspegling haðani av bæði praktiskum og intellektuellum fyribrigdum, sum í dag eru ein natúrligur partur av okkara máli, hóast puristarnir ikki vilja viðurkenna tað.

Danskur etikkur og føroyskt spjaldur

Nýggja føroyska orðabókin hýsir til dømis ikki orðum sum *etikkur* og *æstetikkur*, hóast sagt verður í formælinum, at savnað er úr mæltum máli. Ein føroysk debat uttan hesi orð er óhugsandi í dag og var tað eisini fyri 100 árum síðani. Hinvegin so finna vit bæði nummarplátu og spjaldur í bókini. Hesi hava hvør sín uppruna og týdning, men Bileftirlitið velur at brúka heitið nummarspjaldur heldur enn nummarplátu. Eg havi so enn ongan bil sæð við spjaldri, men síggi javnan seyð við spjaldri. Fellur eitt føroyskt orð (nummarpláta) saman við tí danska (nummerplade), so sigur ráðandi danifoba hugrákið, at her ruggar ikki rætt. Boð er strax eftir nýføroyskt, og hetta ger føroyskt til eitt vandamál, har sjálv sálin við sínum abstrakta sensualiteti er við at bløða burtur. Móðirmálsbúnin hjá einum fólki er ikki nakað sum í sínum uppruna broytist frá degi til dags.

Eitt móðirmál má antin vaksa ella hvørva. Tá vit í Føroyum ikki eiga ein einasta heimskendan filosof, rithøvunda ella vísindamann, sum hevur dimensión ella førleika sum slóðari fyri expansiónini av tí meiri altjóða verbaliseraða hugaheiminum, so mugu vit smyrja okkum við, at ikki øll altjóða fyribrigdi kunnu umsetast niður í okkara verbalu húðaskógvar.

Føroyska alfabetið

Í 50'árunum lærdu vit eitt føroyskt alfabet, sum hevði nógmikið av bókstavum til øll vanlig orð, nøvn, brúkslutir og hugtøk. Vit vóru stolt av at hava eitt frælst sjálvberandi alfabet, sum gjørdi tað óneyðugt hjá okkum at fara uttanlands at lána bókstavir - eitt nú til nøvnini í nýggju telefonbókini ella álmanakkanum. Men síðani tá er máað burturav okkara alfabeti í ólukkumáta, soleiðis at vit í dag ikki hava nakað veruligt føroyskt alfabet, men eina rudimentera bókstavarað, sum als ikki er nøktandi í dagliga samskiftinum, og ger okkum ófræls og heft at útlendskum alfabetum. Henda óvirðilig um enn sjálvgjørda støða er ein stór skomm fyri okkara móðirmál.

Amputerað alfabet

Við hvørjari heimild kunnu okkara puristisku málfrøðingar amputera virknar bókstavir av føroyska alfabetinum og deyðadøma ein hóp í móðirmálinum virkin og neyðug orð? Fylgirnar kenna vit. Tá ein vanligur føroyingur gremur seg um, at hann ikki dugir nóg væl at tosa føroyskt, so meinar hann við, at hann dugir ikki nóg væl nýføroyskt, tí móðirmálið duga vit øll til egnan tørv.

Bókstavaamputatiónirnar hava eisini ítøkiligar avleiðingar: C-vitaminin finst ikki longur á føroyskum, og helst verður føroyingurin enn meira krímfokin nú enn áður. Føroya Musikskúli kann rokna við at fáa átalu fyri framhaldandi at brúka útlendska C-tónan, sum saman við imperialistisku avleykarunum:" C-Dur, C-moll ella Cis-moll" kann skaða óspiltu føroysku musiksálina. Føroyingar hava fyrr klára seg við kvøðing og Kingo í Torvmoll, so hví ikki nú?

Nú kirkjan ætlandi kemur á føroyskar hendur, hava orglini eisini eina óvissa framtíð, tí neyvan verður danski C-tónin við í yvirtøkuni. Men hinvegin, hví skal eitt føroyskt klaviatur eisini partú miðsavnast um ein tilvildarligan útlendskan C-tóna við 261,1 svingningum pr. sekund, tá vit hava okkara egnu tónasmiðir?

Puristiski móðirmálsførleikin

Havandi í huga at okkara gráa máleminenca hevur lagt munin meiri í tað puristiska enn í tað musikalska í sjálvum móðirmálinum, so áttu vit deyðiligu móðirmálslingar helst eisini at havt lært at liva við sakninum eftir C-tónanum, og sum rættir føroyingar tikið ábyrgd og liva við tí tilfangi sum okkara gelda bókstavarað gevur okkum.

Men um vit hinvegin kaga í telefonbókina, so síggja vit, at hundraðtals føroyingar nærmast eru gjørdir navnleysir, tí verandi føroyska bókstavarðin rúmar ikki teirra nøvnum. Sjálvt okkara kendi málvinur og orðabókaútgevar, Zakarias Wang, noyðist uttanlands, tá hann skal skriva sítt navn, tí hvørki Z ella W eru longur at finna í føroysku bókstavarðini, heldur enn tað í matematikkini nógv brúkta X'ið. Á henda hátt verða nøkur okkara *bókstaviliga* sett uttanfyri, og tað er óføroyskt.

Samanumtikið má sigast, at føroyska málið hevur mist ein hóp av nuancum og verður annars í ov stóran mun drenað fyri aktuel og viðkomandi altjóða orð, har tey nýggju heimagjørdu landafrøðis heitini eru eitt gevandi dømi. Ongin kennir nakað aftur og tað er sera óheppið, serliga tá hugsað verður um at føroyingar eru eitt siglandi fólk, sum dagliga hava brúk fyri altjóða heitum á økinum.

Nýggja navnalóggávan vísir vegin

Nýggja navnalóggávan boðar annars frá góðum, tí nú verður aftur møguligt at uppkalla ein av sínum kæru. Har vístu politikarar dirvi og gingu móti tí fyrru taliban líknandi navnalóggávuni -mest umboðandi Úlv og Úlvhildu. Saman við nýggju navnalóggávuni eigur sjálvandi nøktandi føroyskur bókstavaførleiki at fylgja við. Eitt barn navngivið við føroyskum navni skal kunna stava sítt navn á føroyskum. Hett má vera eitt minstakrav, og tað átti Føroya løgting at tikið sær av saman við stovnanini av eini breiðari móðirmáls siðsemisnevnd.

Ein breið móðirmáls siðsemisnevnd umboðandi brúkarar við tilknýti til føroyska samfelagið og við atliti til móðirmálið sum smidligur samskiftismiðil, hevði givið okkum eitt meiri nuancerað móðirmál við fleiri niveaum. Alt frá túnatosi til universitetsstøði innan flest øll fakøkir. Hetta hevði natúrliga fört við sær eina fjølltáttaða altjóðagering av málinum, tí skapandi kreftir - áður múlabundnar - høvdu sloppið framat.

Vist hava vit tekniskt dugnaligar málfrøðingar, men eitt er sjókort at skilja, annað skip at føra. Eitt tosa mál er ein livandi vera og hevur sál og følilsir, sum ein áhaldandi teknisk purisma kann drepa. Men saman við eini breiðari móðirmáls siðsemisnevnd høvdu vit kunna altjóðagjørt málið og rætta uppá tær talibanlíknandi útreinsingar, sum føroyska móðirmálinum hevur verið fyri - øllum at gagni!

Framhald av síðu 12

fyri at fáa eina so dygga umboðan sum gjørligt. Annars hava vit ikki meiri politiskt samstarv við hesar flokkar, enn við allar hinar á tingi. So einfælt er tað. Eisini her roynir gamli norðstreymoyartingmaður urin at villeiða sínar landsmenn.

Skal nøkur meining vera í føroysku umboðanini á danatingi, so má hon brúkast sum frægast. Tí stillaðu vit upp. Og nú brúka vit hana. Til fulnar. Í strembanini fram ímóti teimum frælsu Føroyum. Framímóti føroysku republikkini.

Tað var kanska ikki alt so heilhjarta, tað sum hendi frá føroyskari síðu, á danatingi, áðrenn 20. november 2001. Sum onkur vildi sagt. Ikki sannheit Øssur? Góðan byr útaftur úr hesum altoyðandi, klaustrofobiska sigarmjørkanum. Høgligari er at sigla í góðum líkindum. Tá himin er heiður og silvitni blaktrar. Sum bretar siga: In calm sea every man is a pilot.

Metprísir á uppboðssøluni

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Tað var stórur eftirspurningur eftir fiski á telefonsøluni hjá Fiskamarknaði Føroya í gjár og prísirnir, sum skipini fingu, vóru rættiliga góðir.

Ein trolbátur fekk 33 kr. fyri tosk 1, 32 kr. fyri tosk 2, 24 kr. fyri tosk 3, 22 kr. fyri tosk 4 og 18 kr. fyri tosk 5.

Hetta er metprísur, siga tey á Fiskamarknaði Føroya.

Hýsan hevði eisini góðan prís; hýsa 1 fór fyri 18,70 kr. , hýsa 2 fyri 17,70 kr. og hýsa 3 fyri 14,70 kr. Besti prísurin á tungu var 42 kr. fyri kg.

Ein partrolari, sum seldi um telefonsøluna í gjár, fekk 31 kr. fyri tosk 1, 30 kr. fyri tosk 2, 24 kr. fyri tosk 3 og 22 kr. fyri tosk 4.

Upsin hevði eisini hampiliga góðan prís á telefonsøluni í gjár. Ein snellubátur seldi upsa 1 fyri 5,50 kr., upsa 2 fyri 5,70 kr., upsa 3 fyri 5 kr. og upsa 4 fyri 4,10 kr.

Veður og streymur

Á Fiskamarknaði Føroya siga tey, at tað er veðurlagið og streymviðurskiftini, sum trýsta prísin uppeftir í løtuni.

- Veðrið hevur verið so gott, og nógvur fiskur er komin uppá land, ikki bara her hjá okkum, men eisini uttanlands. Tí hevur fiskaprísurin ikki verið so góður.

Tey vísa á, at ruskut veður saktans kann tæna tí endamáli at trýsta prísirnar uppeftir, og tað er hetta, sum nú er hent .

Nú veðrið hevur verið óstøðugt nakrar dagar, hevur lítil og eingin fiskur verið inni á gólvinum.